# TYRVIBURTURKAST SKAL TIL NÝGGJHEIÐAR

**Nýggj tyrvimóttøka**
Nýggja tyrvimóttøkan hjá IRF og Tórshavnar kommunu er liðug, og alt tyrviburturkast frá vinnuni skal nú koyrast til nýggju støðina í Nýggjheiðum oman fyri Kvívík.

Privat húsarhald skulu framvegis á kommunalu plássini við tyrviburturkasti.

Meira kann lesast um skiljing á www.irf.fo, og fyrispurningar kunnu sendast til irf@irf.fo.

**Mannagongd**

- Ein uppgáva skal vera stovnað frammanundan, áðrenn bilurin sleppur av við burturkastið í Nýggjheiðum.
- Uppgávan verður stovnað av kundatænastuni hjá IRF á tlf. 41 42 43. Uppgávan verður ikki stovnað av starvsfólkunum í Nýggjheiðum.
- Minst til, at bilurin skal vigast, tá ið hann kemur inn á støðina, og tá ið farið verður avstað aftur.

Ringjast skal altíð til IRF á tel. 41 42 43, áðrenn farið verður at koyra til Nýggjheiðar.

**Upplatingartíðir í Nýggjheiðum:**
Mánadag til hósdag kl. 9 – 15
Fríggjadag kl. 9 – 14

IRF

TÓRSHAVNAR KOMMUNA




**Asbest og eternit** skal latast inn í stórsekkjum ella innpakkað á platti. Tað er undir ongum umstøðum loyvt at lata asbest leyst í bingju, sum verður vippað.

Dustið frá brotnaðum asbestplátum kann elva til lungnakrabba, og tí er sera týdningarmikið at fara varliga um og ikki bróta plátur-nar.

Dømi um asbest og eternit: Takplátur, veggjaplátur, bjálvaði rør.




**Gips** skal latast inn fyri seg í stórsekkjum.

Størri nøgdir kunnu latast inn í bingju, men gips skal undir ongum umstøðum blandast við annað tyrviburturkast, tí gips skal tyrvast fyri seg á sermerktum øki.




**Glasull og steinull** skal latast inn fyri seg í stórsekkjum.

Størri nøgdir kunnu latast inn í bingju, men má ikki vera blandað við annað tyrviburturkast.




**Blandað tyrviburturkast** kann latast inn leyst í bingju ella í stórsekkjum.

Til hendan bólkin hoyrir t.d. PVC-rør og keramikkur.

Undir ongum umstøðum mugu asbest, gips, glas- og steinull latast í hendan tyrvibólkin.